# Reglugerð fyri skrivligu próvtøkuna
# 8.-9. fl.

- ✓ Møtt verður 15. min. áðrenn royndin byrjar.
- ✓ Hav løðda teldu og oyralurt/headset við úr stovu 103.
- ✓ Set fartelefonina á flight mode og sløkk WIFI, áðrenn tú leggur hana í kassan í royndarhølinum.
- ✓ Hav øll neyðug amboð við - handbøkur, frymlar, rokniamboð, skriviamboð og evt. gamlar uppgávur.
- ✓ FRAMSETING. Uml. 500 vælvald orð. Framsetingin verður skrivað í Word-tekstviðgerð, goymd sum pdf og uppsent í Wiseflow á Office 365.
- ✓ Tørvar tær pappír, ella skal tú á wc, ger tú vart við teg við at rætta hondina upp.
- ✓ Uppgávurnar í FIMISROKNING verða svaraðar á telduni. Tað er ikki loyvt at nýta roknimaskinu. Loyvt er at brúka frymlar og gulubók.
- ✓ Uppgávurnar í GREIÐSLUROKNING eru á telduni, men royndin fer fram á pappiri. Kladdupappir og innføringarpappir verður útvegað sum vanligt, og loyvt er at nýta gulubók og roknimaskinu umframt hini rokniamboðini. Førast skal inn við svørtum penni. Navn og síðutal skal skrivast á hvørja síðu.
- ✓ Hóast internetið er loyvdur hjálparmiðil, so er týdningarmikið at minnast til, at tú skal gera tína egnu uppgávu. Tað vil siga, at tað er ikki loyvt at kopiera uppgávur av netinum. Sjálvandi kann tú fáa hugskot og íblástur av netinum, og tú kann eisini endurgeva tekst, um tú vísir til kelduna.
- ✓ Vitlíki - ChatGPT ella líknandi kjattbottar/forrit.
  Verður staðfest, at tú hevur brúkt slíkt forrit at loysa tína uppgávu, verður títt avrik ikki góðtikið.
- ✓ Til ber at hava matpakka við og stillisliga fáa sær.
- ✓ **Tú hevur loyvi til at samskifta við vaktirnar í royndarhølinum. Alt annað samskifti er ikki loyvt - hvørki á netinum ella við næmingar í royndarhølinum. Tað er ikki loyvt at spæla spøl ella hyggja at filmi í royndarhølinum.**
- ✓ Tá ið tú er liðug/ur við títt avrik og hevur latið inn, ger tú vart við teg og fer **stillisliga** úr royndarhølinum uttan at órógva hini.
  Tíðin, tá ið tú fer avstað verður skrásett.
- ✓ Um næmingurin ikki heldur seg til galdandi reglur, kann hann verða burturvístur úr royndarhølinum, og heimið verður kunnað um hetta.

GÓÐAN ARBEIÐSHUG 🙂

## Tíðarkarmar til skrivligu próvtøkuna 2025

## í 8. flokki.

Próvtøkan verður avgreidd í O365 umvegis wiseflow í døgunum 2. - 4. og 6. juni 2025. Royndarhaldið fer fram í Niðristovu. Møtt verður til 1.tíma.

| Enskt | 8. flokkur |
|---|---|
| Mánadagur | 2. juni 2025 |
| 08:15 – 09:45 | Máluppgáva |
| 09:45 – 10:15 | Steðgur |
| 10:15 – 13:15 | Framseting |

| Føroyskt | |
|---|---|
| Týsdagur | 3. juni 2025 |
| 08:15 – 09:45 | Máluppgáva |
| 09:45 – 10:15 | Steðgur |
| 10:15 – 13:45 | Framseting |

| Støddfrøði | |
|---|---|
| Mikudagur | 4. juni 2025 |
| 08:15 – 09:15 | Fimisrokning |
| 09:15 – 09.45 | Steðgur |
| 09.45 – 13:45 | Greiðslurokning |

| Danskt | |
|---|---|
| Friggjadagur | 6. juni 2025 |
| 08:15 – 09:45 | Máluppgáva |
| 09:45 – 10:15 | Steðgur |
| 10:15 – 13:45 | Framseting |